# Klassikari á Tjóðpallinum

**Heilir 12 leikarar fara leygarkvøldið á pall í Tjóðpalli Førya, tá klassikarin eftir Tjekhov, Kirsiberjagarðurin, verður frumsýndur. Tað er kendi íslendski leikstjórin, Guðjón Pedersen, ið leikstjórnar**

Leo Poulsen

Russiski leikrithøvundurin, Anton Tjekhov, sigst at vera størsti høvundur í heiminum næst eftir William Shakespeare, og tí ein dreymur hjá øllum sjónleikarum at framføra.

Umframt verk av styttri og longri slag hevur Tjekhov skrivað fýra sjónleikir, Másin, Djadja Vanja, Tríggjar systrar og so Kirsiberjagarðurin, sum Tjóðpallur Føroya nú hevur vant í skjótt sjey vikur.

Leikgongdin er í stuttum henda:

Ljuba Andrejevna, sum eigur góðsið við tí ómetaliga vakra kirsuberjagarðinum, kemur heim eftir at hava verið uttanlands í fimm ár. Bróður hennara Leonid og stjúkdóttirin Varya hava roynt at hildið góðsinum flótandi hesa tíðina, men nú sær út til at garðurin skal á tvingsilssølu. Forrættningsmaðurin Lopakhin roynir at yvirtala tey til at útstykkja garðin til summarhús, og soleiðis ofra tann vakra garðin, men bjarga sær pengaligaliga. Hesum er Ljuba sterkt ímóti, hon vil hava Kirsiberjagarðin at standa sum hann altíð hevur gjørt, men hon hevur einki boð uppá hvussu trupulleikarnir kunnu loysast. Og meðan tey øll halda fram at brúka pengar og vóna at ein loysn fer at koma, nærkast tvingsilssølan í heilum.

**Frumsýning verður á Tjóðpalli Føroya leygardagin kl. 19**

### Nógvir leikarar

Tjekhov er altíð ein stór avbjóðing hjá einum og hvørjum leikara og leikstjóra, og her verður ikki talan um eina traditionella, klassiska uppseting, men um eina modernaða tulking. Persónarnir í leikinum halda lívið vera eina langa veitslu, og tað sæst aftur í sýningini. Salurin á Meiarínum verður brúktur á heilt sermerktan hátt, og leikstjórin lovar eitt satt fýrverk av eini uppliving.

Leikstjórin, Guðjón Pedersen, setti upp "Aftaná Undrið" eftir Jóanes Nielsen í fjør. Eisini tá gjørdi Elin Edda Árnadóttir búnar, og afturat teimum er komin Finnur Arnar Arnarson sum ger pallmyndina. Árni Baldvinsson stendur fyri ljósið og André Niclasen hevur týtt leikin úr russiskum.



*Sum eitt yvirraskandi íkast bakkar eitt Suzuki rugbreyð knappliga inn á pallin, og tað er næstan sum mjølið í krukkuni, at leikararnir blíva við at tøma alskyns viðføri úr tí*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ikki færri enn tólv leikarar eru við, og verður hetta sostatt størsta uppseting higartil á Gamla Meiarínum. Leikarar eru Birita Mohr, Barbara Christophersen, Katarina Nolsøe, Súsanna Tórgarð, Mariann Hansen, Bárður Persson, Hans Tórgarð, Páll Danielsen, Egi Dam, Kári Øster, Hjálmar E. Dam og Kjartan Hansen, ið hevur nomið sær sjónleikaraútbúgving í Luleå í Svøríki og leikar fyrstu ferð á Tjóðpallinum.

# Gjaldsindeksið kvinkar skeiva vegin

**Fríggjadagin kunngjørdi Intrum Føroyar gjaldsindeksið fyri 2010 og tað vísir, at Føroyar kvinka skeiva vegin – men tað gera flestu onnur lond eisini**

Leo Poulsen

Fjórða árið á rað eru Føroyar við í europeiska gjaldsindeksinum hjá Intrum, men meðan vit lógu á einum rímiligum indeksi á 140 tvey tey fyrstu árini, gjørdi Føroyar eitt lop í fjør upp á 146.

Í ár eru Føroyar eisini kvinkaðar eitt vet skeiva vegin, upp á 147.

Gjaldsindeksið umfatar 26 lond í Europa, og tað tykist, sum mentanin í heitaru londunum gongur meiri tann vegin, at fólk taka rímiliga lætt upp á gjaldan av rokningum.

Vánaligastu gjaldararnir eru at finna í londum sum Portugal, Spania, Italia, Grikkalandi og Kypros. Frægast stendur til í Norðurlondum, har Finnland skarar framúr.

Felags fyri so at siga øll lond er tó, at indeksið er farið skeiva vegin seinasta árið. Bert nøkur fá lond hava megnað at halda stand, men tey allarflestu eru farin longur upp eftir stiganum.

Eitt annað, sum sermerkir gjaldsindeksið fyri 2010 er, at fyritøkurnar staðfesta størri tap enn árini frammanundan. Meðan Finnland og Svøríki hildu seg á tapum undir 2% í 2009, eru staðfestu tapini í 2010 frá 2% og til omanfyri 3% av útistandandi.

### Í triðbesta bólki

Finnland er tað landið í Europa, har gjaldsvágin er lægstur, og Finnland er samstundis einasta landið, sum framvegis er í besta bólkinum. Svøríki var, men teir eru dotnir niður í næstbesta bólkin eftir at svenskar fyritøkur í ár hava staðfest størri tap enn árini framman undan.

Í næstbesta bólkinum finna vit tískil nú Svøríki, sum saman við Noregi, Danmark og Íslandi liggja væl fyri sum ábyrgdarfullar tjóðir, tá tað ræður um at rinda sínar rokningar.

Í triðbesta bólkinum finna vit so Føroyar, sum við sínum gjaldsindeksi á 147 liggja ájavnt við Sveits og Írland.

Tað eru serliga tríggir faktorar, ið ávirka gjaldsindeksið í einum landi, og tað er búskaparliga støðan, lógarverkið og mentanin. Og serliga hetta seinasta ger seg galdandi í heitaru londunum, tí mest sum øll lond merkja til fíggjarligu kreppuna so ella so.

Í Føroyum heldur gjaldsindeksið stand, tó at tað kvinkaði eitt vet skeiva vegin frá 2009 til 2010.




*Jákup Bech Jensen, stjóri á Intrum Føroyar, greiðir frá um gjaldsindeksið 2010*